gult cyan magenta svart



# Kynbótaleiðari á Fiskaaling P/F

Av tí at leiðarin fyri kynbótaarbeiðnum hjá Fiskaaling P/F fer í annað starv, er eitt áhugavert og fjøllbroytt starv leyst at søkja á Fiskaaling P/F.

Viðkomandi, ið settur verður, kemur at hava dagligu ábyrgdina av kynbótaarbeiðnum, og skal skipa og leggja hetta til rættis soleiðis, at arbeiðið verður framt undir tryggum og skipaðum umstøðum, soleiðis at allar neyðugar skrásetingar verða gjørdar og goymdar trygt til seinni nýtslu, í samband við úrvalið. Eisini kemur viðkomandi at hava ábyrgdina av samstarvinum við alistøðirnar, har merktur fiskur burtur úr kynbótaarbeiðnum verður aldur og skrásetingar um vekt, lit, kynsbúning og skap síðan verða gjørdar, tá laksurin verður tikin. Við støði í øllum skrásetingum sum gjørdar eru av hvørjum árgangi, skal kynbótaleiðarin síðan skipa fyri og gera familjuúrvalið.

Tann, ið settur verður, kemur at arbeiða í einum mennandi arbeiðsumhvørvi saman við góðum starvsfeløgum og fær møguleikar at menna seg víðari, við at luttaka á ymsum skeiðum uttanlanda.

**Førleikakrøv**
Vit hugsa okkum, at tann sum settur verður, hevur útbúgving frá hægri lærustovni og hevur holla vitan innan arvalæru, stødd- og hagfrøði. Umsøkjarar sum hartil hava praktiskar royndir innan alivinnuna og tá serliga frá støðum sum hava bygt sína framleiðslu á endurnýtslu av vatni hava fyrimun.

Hevur tú hug til stórar avbjóðingar, eitt ábyrgdarfult, viðkomandi og mennandi starv innan føroysku alivinnuna, kunnu vit bjóða tær alt hetta, umframt góðar arbeiðsumstøður og møguleika at menna teg víðari.

Starvið verður sett skjótast gjørligt og tann ið settur verður, kemur fyrstu tíðina at samstarva við verandi leiðara, fyri á henda hátt at fáa møguleika at seta seg skjótari inn í starvið. Lønin verður ásett eftir nærri avtalu, í mun til útbúgving og starvsroyndir.

Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum, skulu sendast P/F Fiskaaling, Við Áir, FO - 430 Hvalvík, í seinasta lagi 25. sept. 2000. Vilja tygum hava nærri upplýsingar um starvið, kunnu tygum seta tygum í samband við P/F Fiskaaling, Símun Joensen, stjóra, telefon 474747 ella 214747, ella við telduposti: simun.joensen@fiskaaling.fo

## Lýsing av P/f Fiskaaling

P/F Fiskaaling er partafelag, har Føroya Landsstýri eigur allan partapeningin. Felagnum er álagt at standa fyri tí føroyska kynbótaarbeiðnum við laksi og sílum. Endamálið við kynbótaarbeiðnum, er at ala fram ein frískan fisk, sum hevur best møguligar eginleikar, soleiðis at føroyska alivinnan er betur kappingarfør á altjóða marknaðinum. Kynbótaarbeiðið byrjaði í 1991 og er seinastu árini ment, soleiðis at í dag verður valt út fyri allar eginleikar, sum til ber at hava við í kynbótaarbeiði við laksi. Fyrstu 5 árini hava 150 familjur verið tiknar við í kynbótaarbeiðnum, men frá 1999 at rokna er støðin víðari útbygd, soleiðis at til ber at hava 400 familjur við í úrvalinum. Eftir seinastu útbyggingina er føroyska kynbótaarbeiðið fult á hædd við kynbótaarbeiðið, sum verður gjørt í øðrum londum. Umframt at standa fyri kynbótaarbeiðnum er felagnum eisini álagt at menna nýggj fiskasløg til føroysku alivinnuna. Í hesum sambandi hevur felagið seinastu árini arbeitt við eini verkætlan innan aling av toski. Hendan er nú steðgað og felagið er farið í holt við eina verkætlan, sum hevur til endamáls at menna alingina av kalva. Sum liður í kynbótaarbeiðnum framleiðir felagið hartil 2000 - 3000 litur av laksarognum árliga umframt nakað av sílarognum. Samlaði umsetningurin í felagnum seinastu árini hevur verið umleið 25 mill. kr.

**P/F Fiskaaling**
Við Áir • FO-430 Hvalvík

---

# PC-Koyrikort




...ein góð íløga

PC-Koyrikortið er samansett av 7 modulum, og miðja skeiðini ímóti at brúkarin lærir at nýta telduna, og teir møguleikar teldan gevur. Set teg í samband við Formula.fo, og vit geva tær eina nærri lýsing av hvat hvørt skeiðið inniheldur, og hvat tú kannst vænta av skeiðunum.

**Grundleggjandi kunningartøkni**
Kunningartøkni yvirhøvur
Stýriskipanin í eini teldu

**Vanligastu forritini**
Tekstviðgerð/Word
Rokniark/Excel
Dátugrunnur/Access
Framløga/Power Point

**Samskifti**
E-postur, internet v.m.

**Nýtt skeið byrjar 18. september 2000**

**formula.fo**
Tel: 311115
Fax: 317115
Stiðjagøta 5 & 11
100 Tórshavn

t-postur: skeid@formula.fo
heimasíða: www.formula.fo

---

## Suðuroyar Ellis- & Røktarheim

Søkt verður eftir sjúkrahjálpara/heilsaatstøðara til starv við arbeiðstíð uppá 0,7 í skiftandi vaktum frá 15. november 2000.

Løn- & setanartreytir sambært sáttmála millum Sjúkrahjáparafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at venda sær til fyristøðukvinnuna, tlf. 37 16 66 lokal 147.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:

**Suðuroyar Ellis- & Røktarheim**
**Fyristøðukvinnan**
**800 Tvøroyri**

innan 25. september 2000.

---

Heimarøktin
Vágar/Norðstreymoy

## Heimasjúkrasystrastarv

Søkt verður eftir heimasjúkrasystir til Sundalagið og Eiði at arbeiða 28 tímar um vikuna í skiftandi dag- og kvøldvaktum frá 1. oktober 2000 ella eftir nærri avtalu.

**Krøv til umsøkjara:**
Sjúkrasystraútbúgving við góðkenning frá danska heilsustýrinum.
Fyrimun hevur umsøkjari sum hevur kunnleika til arbeiði innan Heimarøktina.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Sjúkrasystrafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sonju Klein, økisleiðara, tlf. 333249.

Skrivlig umsók við autorisatiónsprógvi v.m. skal sendast til:

**Almanna- og heilsumálastýrið**
**Starvsfólkadeildin**
**Eirargarður 2**
**100 Tórshavn**

Umsóknarfreist 25. september 2000, kl. 14.00.

---

**VEGG SAGING**
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

**HOL SAGING**
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

**GÓLV FRESING**

**GÓLV SLÍPING**

**GÓLV SAGING**
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

**Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum. Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.**

**FØROYA BETONG SAGING** v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311820



# Handilslærlingur til Skemmuna



*- gerst lærlingur og fá nógvar fyrimunir!*

- **Møguleiki fyri altjóða útbúgving**
- **Spennandi smásøluútbúgving við egnum skúla**
- **Møguleiki fyri akademiøkonom-útbúgving**

**Vit vænta av tær:**
At tú ert samstarvsfús/ur, ert sjálvstøðug/ur, hevur nógva orku og áræði, ert opin og ikki bangin fyri at siga tína meining.

**Tú verður skjótt til nakað - um tú sjálv/ur vilt!**
Tað er einki óvanligt, at ein næmingur í Skemmuni verður tilnevndur deildarleiðari stutt eftir lærlingatíðina, takkað verði teimum avbjóðingum hann fær.
Tey allarflestu verða verandi í Skemmuni tá tey eru liðug at læra - og møguleikarnir eru nógvir.
Í 18 ár hevur "Jysk Sengetøjslager" skapt meira enn 600 arbeiðspláss í Danmark og enn fleiri uttanlands.
Og tað legst afturat ár um ár...

**Felags skúla-uppihald**
Sjálvt skúla-uppihaldið undir lærlingaútbúgvingini fer fram á okkara egna skúla í Norður Jútlandi.
Útbúgvingin fer fram á stats-viðurkendan hátt (øll almenn krøv viðv. útbúgvingini verða lokin), har tú, afturat teimum kravdu lærugreinunum, eisini fær nógv størri fakliga kunnan enn gjøgnum vanliga handilsútbúgving.
Gjøgnum skúla-uppihaldið býrt og etur tú á skúlanum saman við hinum lærlingunum. Hetta gevur eitt einastandandi samanhald - til langt eftir lærlingatíðina.

**Tínir møguleikar fyri víðari útbúgving**
Eftir lokna lærligaútbúgving hava søluassistentar í "Jysk Sengetøjslager" nú møguleika at útbúgva seg víðari til akademi-økonom í handilsrakstri.
Útbúgvingin tekur 3 ár, og fer fram í samarbeiði við Handilsakademiið á Randers Handilsskúla.
Skift verður alla tíðina millum uppihald í handlinum og uppihald á skúlanum.

**Nær skalt tú byrja?**
Lærlingaplássið skal setast so skjótt sum møguligt.

**Ljóðar hetta spennandi?**
Send so eina skrivliga umsókn skjótast gjørligt til:

**SKEMMAN**
Staravegur 7 • FO-100 Tórshavn • Tel. 31 55 88

Sosialurin - 311820

---

# Tórshavnar Musikkskúli

Pláss er fyri næmingum, 10 ár ella eldri, til fagott at byrja beinanvegin.

Áhugað kunnu ringja á tlf. 31 32 17 millum kl. 09.00 og kl. 20.00.

---

**Lesið Sosialin**

---

# Hjálparfólk

**til Tilhaldið í Tórsgøtu.**

**Førleikakrøv**
Søkt verður eftir starvsfólki við drúgvum royndum og hóskandi útbúgving. Kunnleiki, hugur og hegni til at arbeiða við menniskjum er ein fyrimunur. Neyðugt er eisini at duga at arbeiða sjálvstøðugt, vera fyrikomandi, hava góð samstarvsevni og at hava áhuga í samfelagsligum viðurskiftum .

**Setunarviðurskifti**
Starvið verður at seta skjótast til ber, og er lønt sambært sáttmálanum við TKST.

**Meir fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Vanju Petersen, leiðara, tlf. 316491, ella Janus Isfeldt, lønarfulltrúa, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal verða Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 25. september 2000, viðmerk umsóknina: "hjálparfólk".

Endamálið við Tilhaldinum er, at geva pensiónistum í Tórshavnar kommunu møguleika og umstøður til fjøltáttaða samveru í hugnaligum umhvørvi.

Tórshavnar kommuna

WWW.TORSHAVN.FO

---

*Nú hevur tú møguleika at ogna tær*

# TALAÐA ORÐIÐ

frá Rhema

Talandi Orðið

Orðið varð hold og tók bústað millum okkara

Sum nakað nýtt fer samkoman Rhema at geva út eina mánaðarkassett við áhugaverdum evnum.

Hevur hetta tín áhuga, kanst tú tekna teg sum lim í kassettuklubbanum og fáa góða undirvísing við postinum hvønn mánað.

KOSTNAÐUR:
☐Mánaðarkassett í 1 ár íroknað postgjald kr. 360,-
☐Mánaðarkassett í 1/2 ár íroknað postgjald kr. 190,-

Ynskir tú at gerast limur setur tú kross við um tú vilt gjalda fyri 1/2 ella 1 ár, flytir peningin á konto í Føroya Banka nr. 6460 494 456 0 og tú fært bondini sendandi.

*Skriva navn og bústað á lepan*

Navn:______________________

Bústaður:______________Tel. nr. ________

Postnr.: _______ Býur/bygd: ____________

og send hann til:
**Rhema Bandtænastan, Postboks 1109, 110 Tórshavn**

ella ring bíleggingina inn á tel. nr. 31 01 91/31 39 61

---

**Toll- og Skattstova Føroya,**
Eysturoyar Øki

# Starv í Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar Øki

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar Øki er starv sum avloysari leyst at søkja fyri skrivstovufólk í farloyvi, frá 01. oktober 2000 til 31. mars 2001.

**Arbeiðsuppgávur**
Eftirlitsarbeiði innan toll, mvg, skatt o.a.

**Førleikakrøv**
Tann, sum settur verður, skal helst hava merkonomútbúgving ella líknandi, vera arbeiðssamur, fyrikomandi, kunna arbeiða sjálvstøðugt og skal vera førur fyri at mynda avgerðir í dagliga arbeiðinum.

**Setanartreytir**
Løn- og setanarviðurskifti eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvum, ummælum og upplýsingum um starvsroyndir skulu sendast til Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar Øki, Postboks 225, 600 Saltangará **innan 16. september 2000.**

**Toll- og Skattstova Føroya**
Eysturoyar Øki
Postboks 225
FO-600 Saltangará

***Um stovnin***
*Toll og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, avgjalds-, mvg-, inntøkuskattalógina og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum. Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Saltangará, Klaksvík og í Tórshavn, røkja raksturin. Í Eysturoyar Øki, har viðkomandi kemur at starvast, starvast 16 fólk.*

---

# FERIA

**Vit hava stongt vegna feriu frá 8. sept. til 26. sept.**

Húðrøktarstovan
BEAUTY LINE
v/ Elin Madsen
N. Finsensgøta 16 • 100 Tórshavn • Tel. 320 321

---

# Tannrøktari søkist

Fyri tannrøktara í farloyvi søkja vit avloysara fram til summari 2001.

**Tannlæknastovan**
Heigavegur · Saltangará
Tel. 447407